Álit

í

løgtingsmáli nr. 15/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (COVID-19, dagpeningur vegna sóttarhald, dagpeningur til fólkapensjonistar, endurgjald til arbeiðsgevara, víðkaður rættur til sjálvstøðug vinnurekandi o.a.)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 1. september 2020, og eftir 1. viðgerð 9. september 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. og 22. september 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Í lógaruppskotinum er ásett, at landsstýrismaðurin kann seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð. Trivnaðarnevndin metir, at rættast er at hava eina dagfesting fyri, nær lógin verður sett úr gildi.

Tískil setir ein samd nevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. september 2020 og fer úr gildi 1. mars 2021."

Viðmerkingar:
Við hesi broyting fer løgtingslógin úr gildi 1. mars 2021. Tað vil siga, at løgtingslógin er í gildi til og við 28. februar 2021.

Við hesi broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 24. september 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Edva Jacobsen

Jóhan Eli Poulsen

Frimodt Rasmussen